# Fyrsta motor-cross kappingin



*Tað gekk lívliga fyri seg, tá fyrsta motor-cross kappingin í Føroyum varð fyriskipað um vikuskiftið*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Leygardagin varð fyri fyrstu ferð kappast í motor-cross kapping í Føroyum, tá tíggju motor-hugaðir føroyingar dystaðust uppi við Kleynisvarða.

Kappast varð í trimum bólkum. Vanlig motor-cross, har Leon Erik Heinesen varð besti koyrarin. 4-hjóls motor-cross, har Agnar Dahl vann. Og so varð eisini kappast fyri børn, og vann Óli Dahl ta kappingina.

Agnar Dahl, sum er ein av fyriskiparunum av kappingini, sigur, at eftir teirra meing var talan um eina góða kapping. Ikki minst fegnast hann um, at tað við hesum ber til at koyra undir skipaðum viðurskiftum.

- Tað verður jú koyrt við motor-cross úti á almennu vegunum, og tað er ikki meira enn næstbest. Men áðrenn tað verður sagt, hvar tað ikki skal koyrast, so burdu vit kanska fingið eitt øki, har vit skulu koyra, heldur Agnar Dahl, sum avgjørt roknar við, at líknandi tiltøk eisini verða fyriskipað framyvir.

**-jm**

# Neistavenjarin komin upp á pláss

**Neistin hevur tryggjað sær venjarin til mansliðið komandi kappingarár. Talan er um danan Claus Rasmussen, ið herfyri var og hugdi eftir umstøðunum í felagnum**

HONDBÓLTUR

*Terji Nielsen*

*terji@sosialurin.fo*

Sum vit skrivaðu her í blaðnum fyri einum mánaði síðani, var samband millum Neistan og Claus Rasmussen um venjarastarvið komandi kappingarár. Nú eru partarnir komnir ásamt um eina avtalu, og hon verður væntandi undirskrivað seinni í mánaðinum.

### Eingin Oros

Formaðurin í Neistanum, Jón Kragesteen, sigur, at teir hava gjørt eina munnligu avtalu við Claus Rasmussen, ið skal taka sær av mansliðnum.

- Vit hava ikki skrivað undir enn, men hann kemur til Føroya 20. apríl, og tá er ætlanin at skriva undir, sigur Jón Kragesteen.

Danin er í løtuni venjari hjá einum kvinnuliði á Falster, og hann er giftur við føroysku Guðrun Horn úr Havn, sum hevur sínar røtur í Neistanum.

Viðvíkjandi spurninginum um leikarahópin komandi ár sigur Jón Kragesteen, at har er ikki so nógv komið upp á pláss enn.

- Tað er tó greitt, at Damir Oros kemur ikki aftur. Hinir báðir útlendingarnir, Blagoje Buha og Zelkjo Jotic, verða kanska við. Jota verður undir øllum umstøðum málmansvenjari í felagnum, meðan tað er meiri ivasamt, um hann fer at spæla eisini. Jota er farin um tey 40, og hann hevur eitt ógvuliga krevjandi kropsligt arbeiði, ið ger, at orkan til at spæla hondbólt ikki er serliga stór, greiðir Jón Kragesteen frá.

### Vilja fegin hava Inga at halda fram

Spurningurin, um hvør ið skal venja kvinnurnar, er enn ikki avgreiddur, men Jón Kragesteen dylur ikki fyri, at felagið gjarna vil hava Inga Olsen at halda fram í starvinum.

Ingi hevur ikki tikið støðu enn. Hann skal skurðviðgerast mitt í hesum mánaðinum, og um úrslitið av skurðviðgerðini verður, at hann ikki kann spæla sjálvur meiri, so hava vit kanska ein venjara til kvinnurnar, sigur Jón Kragesteen og leggur afturat, at hann sjálvsagt vónar, at tað gongur Inga væl við skurðviðgerðini.

# Sum í ævintýrinum hjá FCK

**Eftir at teir høvdu verið illa staddir, eydnaðist tað kortini FCK at fáa øll stigini við úr Odense, og nú kann rættuligur spenningur koma í, um tað sunnudagin fer at eydnast FCK at vinna ímóti Brøndby, sum einki fekk burturúr vikuskiftinum**

SUPERLIGAN

*Jóannes Hansen*

Tað er lagt upp til spenning í superliguni. Í vetrarsteðginum var Brøndby so nógv frammanfyri hini á støðutalvuni, at eingin roknaði við møguleikanum, at tað skuldi gerast spennandi. Men í trimum teimum fyrstu umførunum eftir vetrarsteðgin hevur Brøndby fingið tvey stig, og FCK hevur fingið fulla úrtøku ella níggju stig.

Hesa ferð spældi Brøndby væl á heimavølli, men teir taptu 1-0 ímóti FCM, sum er næstfremst og átta stig aftanfyri Brøndby. Nýggi svenski FCM málverjin, Ola Tidman, var ógvuliga stinnur.

FCK var í Odense, og har var tað sum í ævintýrinum hjá 200 ára gamla H. C. Andersen, sum var ættaður úr Odense og sum búði í Keypmannahavn. Tað sá illa út hjá FCK. OB spældi betri, og í 1. hálvleiki løgdu teir seg framum. Álopsspælararnir hjá FCK, Álvaro og Zuma, vóru lítið eyðsýndir, og teir megnaðu ikki at fáa mál, men tað hjálpti væl upp á spælið, tá ið Jesper Bech varð settur á miðvøllin í vinstru fyri Magne Hoseth, sum heldur ikki var serliga eyðsýndur.

Miðskeiðis í 2. hálvleiki javnaði miðvallarin Michael Silberbauer, og í yvirtíðini var hann aftur upp á spæl og stútaði frísparksinnlegg úr vinstru í málið, og so hevði FCK vunnið 2-1.

Sunnudagin fær FCK í Parkini vitjan av Brøndby, og tað verður roknað við, at allir sessirnir í Parkini fara at vera upptiknir.

Viborg vann 2-1 á heimavølli ímóti AaB. Harvið er Viborg á fjórða plássinum trý stig frammanfyri OB á fimta plássinum. Fjórða plássið telur nógv, tí tað ber atgongd til Royalu liguna við sær, og tað seta teir í Danmark ikki so lítlan prís uppá.

Í botnstríðnum lætti Randers sær av aftasta plássinum, tá ið teir á heimavølli vunnu 1-0 ímóti ikki serliga gramma AGF. Herfølge er aftast, eftir at teir í Farum vóru annar parturin av málleysum javnleiki. FCN er omanfyri strikuna, men teir hava sama stigatal sum Randers.

Silkeborg var í niðurflytingar vanda í vetrarsteðginum. Nú sær væl ljósari út. Sunnudagin vann SIF 2-1 á heimavølli ímóti Esbjerg, og nú er frástøðan til strikuna sjey stig. Esbjerg er langt frá bronsuplássinum, sum teir vunnu fyri einum stórum ári síðani.

# Coventry lætti sær á

Claus Bech Jørgensen spældi 79 minuttir av dystinum, tá Coventry við einum 2-1 sigri á Brighton lyfti seg upp um niðurflytingarstrikuna í næstbestu ensku deildini.

Undan dystinum var Brighton trý stig framman fyri Coventry, og fyri steðgin var ikki so nógv, ið bendi á, at hetta skuldi broytast so øgiliga nógv. Gestirnir hildu seg hava lagt seg á odda, tá Mark McCammon sendi bóltin í kassan, men hetta varð ikki góðkent av dómaranum.

Ístaðin kundi Coventry leggja seg á odda við brotssparki tíðliga í seinna hálvleiki, men tá Brighton stutt seinni javnaði, tóktist javnleikurin gerast endaliga úrslitið.

Men sjey minuttir fyri leiklok bragdaði hjá heimaliðnum. Steve Staunton kom niðan úr verjuni, og tá eingin leikari kom ímóti, høgdi hann til, og bólturin smeyg sær í kassan dygst úti við stólpan.

**-jm**